VINNUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF TRADE AND INDUSTRY

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 17. mai 2026
Mál.: 26/11635
Viðgjørt AE
Tygara skriv: 52-103/2025

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-104/2025 frá Hermann R. Samuelsen, løgtingmanni, settur landsstýrismanninum í vinnumálum, Jacob Vestergaard, um asfaltering av Oyrarvegnum

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at raðfesta asfaltering av Oyrarvegnum í nærmastu framtíð?
2. Um ja, nær kann væntast, at arbeiðið verður framt?
3. Um nei, hvat ætlar landsstýrismaðurin annars at gera fyri at bøta um støðuna á hesum vegastrekki?

Svar til spurning 1,2 og 3:
Norðoyrarvegurin er umleið 2,2 kilometrar. Í 2013 vórðu ábøtur gjørdar á vegin. Gongubreytir vórðu gjørdar frá Klaksvík til Norðoyrar, ein partur av vegnum varð asfalteraður og ymiskt annað varð eisini gjørt. Tað kostar umleið 3 mió. kr. at asfaltera Oyrarvegin.

Ásannast má, at ov lítið av peningi verður játtað til at viðlíkahalda landsvegakervið. Síðan 2023 hevur asfaltering tó verið raðfest við egnari játtan á Fíggjarlógini. Fyrsta árið var játtanin 10 mió. kr. og síðan 12 mió. kr. Samanlagt eru 46 mió. kr. játtaðar í tíðarskeiðinum 2023 – 2026, og 27,4 kilometrar eru asfalteraðir samanlagt.

Harumframt eru einstøk ár serstakar játtanir til asfaltering, eitt nú 4 mió. kr. til Elduvíkarvegin í 2025, har 4,5 km vórðu asfalteraðir. Eisini verða vegir asfalteraðir í sambandi við vegagerð annars, til dømis vegurin gjøgnum Húsavík í samband við Dalstunnilin.

Landsvegakervið er umleið 480 kilometrar. Í miðal eiga vegirnir at verða asfalteraðir umleið fimtanda hvørt ár. Tað merkir, at vit áttu at asfalterað einar 32 kilometrar hvørt ár fyri at halda vegakervið í góðum standi.

Landsverk metir, at tað er átrokandi neyðugt at asfaltera umleið 100 km. av landsvegi. Ein av hesum vegum er Oyrarvegurin. Í miðal kostar tað umleið 1,8 mió. kr. at asfaltera 1 kilometur av vegi. Sostatt røkkur játtanin bert til einar 6,7 km um árið. Tí er tað eisini trupult at raðfesta.

Í ár hevur Landsverk gjørt sáttmála um at asfaltera vegin millum Norðasta Horn og Velbastað, vegin gjøgnum Velbastað og ein part av vegnum gjøgnum Sands bygd. Tilsamans er talan um umleið 5,5 km av vegi, ið kosta umleið 10 mió. kr. at asfaltera. Írestandi 2 mió. kr. verða brúktar til smærri ábøtur. Niðanfyri sæst talva, sum vísir vegastrekki, ið eru asfalterað árini 2023 – 2026 av játtanini til asfaltering.

Talva 1, vegastrekki asfalterað 2023 – 2026

2023		
Ábøtur	1,0 mió. kr.	
Kollafjørð	2,8 mió. kr.	1,5 km
Gøtu	4,3 mió. kr.	2,5 km
Kambsdal	2,2 mió. kr.	1,4 km
2024		
Vatnsoyrarvegurin	8 mió. kr.	6 km
Kaldbaksvegurin	2 mió. kr.	1,5 km
2025		
Kollafjørð	1,8 mió. kr.	1 km
Millum Fjarða	6,8 mió. kr.	5 km
Kaldbaksvegurin	4,5 mió. kr.	3 km
Syðradal	0,4 mió. kr.	
2026		
Velbastað	2 mió. kr.	1,5 km
Sandoy	2,2 mió. kr.	1 km
Velbastaðsháls	5,6 mió. kr.	3 km
Ábøtur	2 mió. kr.	
Samanlagt	**45,6 mió. kr.**	**27,4 km**

Landsstýrismaðurin er samdur við løgtingsmanninum. Oyrarvegurin hevur stóran týdning fyri borgarar á Norðoyri og økið har um leiðir, og skal verða í góðum standi. Neyðugt er at asfaltera vegin, og vónandi ber til at raðfesta arbeiðið innan rímiliga tíð.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður